# Bygdaráðsfundur

**Bygdaráðsfundur 03.12. 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Bygdaráðssalurin | |
| Hjástødd vóru: | Símin Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Jákup M. Kjeld | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Alfred Olsen - ref. | x |

**Mál nr. 157/2012 Fíggjarmál**

J. nr. 2009-0042-0242

Semja er um prís fyri ognirnar á Sandi Mikla, sum Nes – og Runavíkar kommunur skulu yvirtaka.

**Fíggjarnevndin mælir til at keypa ognina í inniverandi árið,**
**og at fíggja hetta av tøkum peningi.**
**Hetta verður so í samráð við Runavíkar kommunu.**
**Bygdaráðið samtykti einmælt málið við 2. viðgerð, sum hervið er endaliga avgreitt av bygdaráðnum.**

**Mál nr. 158/2012 Vegamál**

J. nr. 2011-0044-0053

Borgarar við Brekkuveg heita í skrivi dagf. 17.10.2012, á Nes kommunu um at gera ferðsluforingar á Brekkuvegnum.

**Bygdaráðið samtykti at mál nr. 158/2012 og 159/2012 vera tikin upp undir einum fyrst í komandi fíggjarárið.**

**Mál nr. 159/2012 Vegamál**

J. nr. 2012-0044-0062

Í skrivi heita borgarar við Heygsveg, innari partur, á Nes kommunu um at gera ferðsluforðingar á vegnum.

**Tekniska nevnd mælir til, at í fyrsta føri verða hóskandi skeltir 30 km. sett upp á Heygsvegnum.**

**Um ætlanin við bygging av íbúðum fram við Heygsvegi fer í gongd,**
**verður teinurin norður frá vegamótinum Heygsvegur/Brekkuvegur**
**broyttur munandi við gongubreyt v.m.**
**Bygdaráðið samtykti at mál nr. 158/2012 og 159/2012 vera tikin upp undir einum fyrst í komandi fíggjarárið.**

**Mál nr. 162/2012 Mentamál**

J. nr. 2012-021-0043

Skúlastýrið søkir um eykajáttan til skúlabókavørðarnar. Hugsað verður um 10 tímar til saman.
Játtanin skal helst brúkast í 2012.
Hin 18.10.10 fekk skúlabókasavnið játtað 10 tímar, men peningurin var ikki brúktur tá, tí telduskipanin var ikki klár.
Tá var samtykt, at peningurin skuldi takast av bygdabókasavninum.

**Mentanarnevndin mælir til at játta 10 tímar**
**Fíggjarnevndin mælir til at játta pengarnar til skúlabókasavnið og taka hetta av bygdabókasavnið "fundarpening".**

**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 163/2012 Mentamál**

J. nr. 2012-0023-0118

Umsøkn um stuðul til ævisøgu um Herman Jacobsen.

**Mentanarnevndin mælir frá at játta stuðul.**
**Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.**

**Mál nr. 164/2012 Mentamál**

J. nr. 2011-0024-0006

Í skrivi 17.11.2012 søkir Flot um nýggjar flótibanar til svimjihylin. Teir eru afturgjørdir nakrar ferðir, men nú verður hildi, at ikki er ráðiligt at gera teir aftur.
Tilboð er komið frá Ergo: Kr. 26.656,00

**Mentanarnevndin mælir til at taka málið uppaftur tá nýggja fíggjarárið byrjar.**
**Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.**

**Mál nr. 165/2012 Trivnaðarmál.**
J. nr. 2012-0031-0137
Í skrivi dagfest 03.09.2012 søkir Eyst. Barnaverndartænasta um eina eyka játtan fyri fíggjarárið 2012 uppá íalt kr. 549.000. Parturin hjá Nes kommunu verður 110.000,00 kr. í eykajáttan til virksemið.
Trivnaðarnevndin mælir til at Nes kommuna rindar sín part av eykajáttanini.
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.
Fíggjarnevndin staðfesti, at á verandi fíggjarætlan fyri 2012 eru 30.000 kr. ov nógv avsett til barnaverndartænastuna.
Eykajáttanin verður sostatt kr. 80.000 – fíggjarnevndin mælir til at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt á bygdaráðsfundinum hin 01.10.2012,**
**Bygdaráðið samtykti einmælt málið við 2. viðgerð, og er tað sostatt endaliga avgreitt frá bygdaráðnum.**

**Mál nr. 166/2012 Fíggjarmál.**
J.nr.2012-0011-0029
Ymiskar reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2012

| | | |
|---|---|---|
| **Reguleringar viðv. rakstur** | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | kr. | 231.000 |
| §2 Almanna og Heilsumál | kr. | -21.000 |
| §3 Børn og Ung | kr. | -351.000 |
| §4 Skúlin | kr. | 490.000 |
| §5 Mentan og frítíð | kr. | -30.000 |
| §6 Teknisk mál | kr. | 155.000 |
| §7 Kommunal mál | kr. | -230.000 |
| §20 Inntøkur v.m. | kr. | -310.000 |
| **reguleringar rakstur** | **kr.** | **-66.000** |

| | | |
|---|---|---|
| **Reguleringar Íløgur** | | |
| §3 Børn og ung | kr. | -30.000 |
| §4 Skúlin | kr. | 200.000 |
| §7 Kommunal mál | kr. | 150.000 |
| reguleringar íløgur | kr. | 320.000 |

| | | |
|---|---|---|
| rakstur og íløgur | kr. | 254.000 |

**Tilmæli frá Fíggjarnevndini er at meirjáttanin á kr. 254.000 verður tikin av tøkum peningi.**
**Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 167/2012 Fyrisitingarmál. Alm.**
J. nr. 2012-0004-0014
Kommunan skal áseta og lýsa teir almennu bygdaráðsfundirnar fyri komandi ár. Siðvenja er, at bygdaráðsfundirnir eru mánadagar kl. 19.00, Uppskot til bygdaráðsfundirnar í 2013, sum skulu verða 10 í tali, er.

Mánadagin 28. Januar
25. februar
18. mars
15. apríl
13. mai
24. juni
2. sept.
7. okt.
4. nov.
2. des.
Nevndarfundirnir eru í aðru viku undan bygdaráðsfundinum.

**Bygdaráðið samtykti einmælt uppskotið til bygdaráðsfundirnar í 2013.**

**Mál nr. 168/2012 fíggjarmál**
J. nr.
Høvuðstølini til fyrstu viðgerð av fíggjarætlan 2013 hjá Nes kommunu, eru hesi:

| **Rakstur** | | **Broyting pr. 29.11.2012.** | |
|---|---|---|---|
| | | **1. viðg.** | **2. viðg.** |
| §1 Kommunal fyrisiting | kr. | 3.838.000 | 3.808.000,00 kr. |
| §2 Almanna- og heilsumál | kr. | 3.573.000 | 3.573.000,00 kr. |
| §3 Børn og ung | kr. | 9.866.000 | 9.866.000,00 kr. |
| §4 Undirvísing | kr. | 3.828.000 | 3.828.000,00 kr. |
| §5 Mentan og frítíð | kr. | 2.271.000 | 2.301.000,00 kr. |
| §6 Teknisk mál | kr. | 3.403.000 | 3.403.000,00 kr. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| §7 Kommunal virki | kr. | 3.222.000 | 3.222.000,00 kr. |
| **Rakstur í alt** | **kr.** | **30.001.000** | **30.001.000,00 kr.** |
| | | | |
| **<u>Íløgur</u>** | | | |
| §5 Mentan og frítíð | kr. | 360.000 | 360.000,00 kr. |
| §6 Teknisk mál | kr. | -215.000 | -215.000,00 kr. |
| **Íløgur í alt** | **kr.** | **145.000** | **145.000,00 kr.** |
| | | | |
| **<u>Rakstur og íløgur í alt</u>** | **kr.** | **30.146.000** | **30.146.000,00 kr.** |
| | | | |
| Rentustuðul | kr. | 960.000 | 960.000,00 kr. |
| Rentuútreiðlsur | kr. | 1.570.000 | 1.570.000,00 kr. |
| Rentuinntøkur | kr. | -20.000 | - 20.000,00 kr. |
| Kommunuskattur | kr. | -32.603.000 | -32.603.000,00 kr. |
| Húsaleiguskattur | kr. | -60.000 | - 60.000,00 kr. |
| Felagsskattur | kr. | -1.000.000 | - 1.000.000,00 kr. |
| Kapitaleftirlønir | kr. | -600.000 | - 600.000,00 kr. |
| Aðrar inntøkur | kr. | -124.000 | - 124.000,00 kr. |
| **<u>Úrslit</u>** | **kr.** | **-1.731.000** | **-1.731.000,00 kr.** |

**<u>Til afturgjaldan av skuld</u>**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Afturgjald av skuld | kr. | -1.731.000,00 kr. | -1.731.000,00 kr. |

Fíggjarætlanin fyri 2013 var soleiðis samtykt á bygdaráðsfundinum hin 05.11.2012, við fyrstu viðgerð.

**<u>Fíggjarætlanin fyri 2013 - 2. viðgerð</u>**

Framløgd blivu tvey broytingaruppskot:

Nr.1.
Framlagt bleiv broytingaruppskot um at hækka játtanina til Tofta Ítróttarfelag, (vaksnamanndeildina) við 300.000,00 kr. sum verður fíggja við at hækkað kontoina «søla av grundstykkjum»

Nr.2.
Framlagt bleiv broytingaruppskot til verandi fíggjarætlan, um at hækka játtanina til Tofta Ítróttarfelag § 5 við 30.000,00 kr. og lækkað § 1 «Kommunal fyrisiting» við hesi upphædd.

Atkvøtt var fyrst um uppskot nr. 1. - Tað fekk 2 atkvøður fyri (Súni í Hjøllum og Petur J. Petersen) 4 vóru ímóti (Elin á Torkildsheyggi, Súnfríð Jacobsen, Jóhannus Danielsen og Jákup M. Kjeld) 1 var blonk (Símun Johannesen).

Síðani var atkvøtt um uppskot nr. 2. - sum fekk 5 atkvøður fyri (Elin á Torkildsheyggi, Súnfríð Jacobsen, Jóhannus Danielsen Jákup M. Kjeld og Símun Johannesen) ongin var ímóti og 2 blankar (Súni í Hjøllum og Petur J. Petersen).

Fíggjarætlanin fyri 2013 var samtykt við 2. viðgerð við 5 atkvøðum fyri (Elin á Torkildsheyggi, Súnfríð Jacobsen, Jóhannus Danielsen, Jákup M. Kjeld og Símun Johannesen) ongin var ímóti og 2 blankar (Súni í Hjøllum og Petur J. Petersen).

**Fíggjarætlanin 2013 sostatt endaliga samtykt.**